# Kunngerð

Vísandi til samtykt bygdaráðsins tann 26. juni 2006 fer

**vegleiðandi fólkaatkvøða fram ley–gardagin tann 9. september 2006.**

Fólkaatkvøðan fer fram í skúlahøllini í 1974 skúlanum

**frá kl. 10.00 til kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá fólkaatkvøðan lýst liðug.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 9. september 2006.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri fólkaatkvøðuna við at boða kommunuskrivstovuni frá – helst innan kl. 15.00 hósdagin 7. september 2006 á tlf. 441.012.

**Valkort:**
Valkort verða send út við postinum. Um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

Gøtu tann 24. juli 2006

**GØTU KOMMUNA**

Páll Isholm
borgarstjóri

Götu Kommuna

# Kunngerð

Vísandi til bygdarráðssamtykt 26. juni 2006 fer

**vegleiðandi fólkaatkvøða fram leygardagin tann 9. september 2006.**

Fólkaatkvøðan fer fram á kommunuskrivstovuni

kl. 10.00 – kl. 20.00

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá fólkaatkvøðan lýst liðug.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 9. september 2006.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri fólkaatkvøðuna við at boða kommunuskrivstovuni frá – helst innan kl. 15.00 hósdagin 7. september 2006 á tlf. 443 006.

**Valkort:**
Valkort verða send út við postinum. Um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

Leirvík, tann 24. juli 2006

**LEIRVÍKAR BYGDARRÁÐ**

Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

FS VÁGAR

# Umsitingarligur leiðari

**FS Vágar søkir eftir fólki til umsiting felagsins.**

www.fsvagar.fo

FS Vágar er fótbóltsfelag, ið leggur stóran dent á at menna fótbóltin í vesturøkinum. Í tí sambandi søkir felagið eftir fólki í parttíðarstarv til at røkja umsitingarligar uppgávur.

Vit vænta at tú ert nærløgd/lagdur og álítandi, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og eisini, at tú dugir at arbeiða við bókhaldi. Vit kunnu bjóða eina spennandi avbjóðing í einum spennandi starvi, sum tú saman við nevndini kemur at menna eftir tínum og felagsins tørvi. Løn og setanarviðurskiftir vera eftir avtalu.

Meira fæst at vita við at ringja á 533053.

Møguligar umsóknir skulu vera okkum í hendi seinast 15. august 2006.

FS Vágar
v/ Albert Ari Thomassen
Postboks 51
FO-370 Miðvágur

# Leiðari til dagstovnin Látipípuna

Hervið verður søkt eftir leiðara til dagstovnin Látipípuna hjá Vestmanna Kommunu.
Stovnurin er normeraður til 22 børn í útibarnagarði og til børn úr 1. og 2. flokki í frítíðarstovu.

Leiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving, og starvið verður sett frá í seinasta lagi 1. oktober 2006 at rokna.

Dámar tær væl at skipa fyri og at vera úti í náttúrini, er hetta møguliga nakað fyri teg!

Lønin er sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagog–felag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maluna Stórá á Dagstovninum Látipípuni, tlf. 470146 ella 230145.

Umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum um mælum skal verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta laagi 21. august 2006, kl. 12.00.

Vestmanna Kommuna



www. Sosialurin .fo

# Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur fra SAHVA

verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 29. august 2006 og á **Landssjúkrahúsinum** 1. september 2006.

Tíð fæst við at ringja á **tlf. 45 45 45**, mánadag og týsdag kl. 10-12, í seinasta lagi týsdagin 22. august 2006.